# Franskir føroyafjepparar

**Hóast tað neyvan verður roknað við nøkrum skreytum frá okkara monnum hesaferð, so eru tað eisini fronsk viðhaldsfólk, sum tykjast stuðla liðnum**

FJEPPARAR
*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Bethune, Frakland:** Gjøgnum tíðina hevur føroyska fótbóltslandsliðið vunnið sær hópin av vinum uttanlands. Smáu oyggjarnar, sum í so nógvar mátar hava bjóðað teimum stóru tjóðunum av, eru á sín hátt ímyndin av dystinum millum David og Goliath. Ein ímynd, ið mest sum altíð vinnur samkenslu og áhuga.


*Hóast fjepparin ivaleyst hevði gjørt sær stóran ómak, so var onkur myndin komin skeivt fyri. Nakað sum føroysku spælararnir hildu vera óføra stuttligt*

Og Frakland er einki undantak í so máta. Eini 20-30 fjepparar sóust soleiðis longu til fyrstu venjingarnar, og spent stóðu hesi og bíðaðu, meðan liðið vandi. At sleppa framat spælarunum, var tó ikki bara sum at siga tað. Trygdin kring landsliðið hevur sjáldan verið so góð, sum er tað á hesi ferðini, og meðan ferðalagið alla staðni hevur eskortu av løgreglubilum og - motorsúkklum, standa vaktarmenn eisini við venjingarvøllin, soleiðis at eingin av áskoðarunum sleppur inn um gyrðingina.

Eftir venjingina góvu føroyingarnir tó loyvi til, at fjepparanir kundu sleppa so nær stjørnunum, sum tey sjáldan munnu sleppa tað, tá meira navnframar fótbóltstjóðir enn tann føroyska vitja.

Og serliga mundi ein av fjepparanum vera fegin um hetta høvi. Kvinnan, sum talan er um, hevði gjørt sær eina stóra plakat, har hon hevði savnað myndir av øllum teimum føroysku spælarunum, og gleðin var stór, tá spælararnir ein og ein settu navn sítt á plakatina. Og tá hon so eisini fekk loyvi at verða avmyndað mitt í leikarahópinum, mundi frøin ongan enda taka. Í øllum førum var orðafloymurin øgiligur, tá myndin varð tikin, og tó at spælararnir ikki mundu skilja stórvegis av hesum, so høvdu teir eisini hug at smílast.

So hvør veit, um tað ikki eru fleiri enn bara føroyingarnir á leikvøllinum, sum fara at díkja á Føroyar leygardagin. Kundi hent seg, at stuðulsrópini eisini koma á fronskum - og tey skulu so undir øllum umstøðum vera vælkomin.

Daewoo Leganza 2.0 CDX - Aut. gear



Leðursetur, el-innstilling av førarasetri, servostýring, fjarstýrt sentrallás, el-rútar, el-spegl, klimaanlegg, fartpilot og cd-spælara. Ein luksusbilur í sera góðum standi.

- Ár. apríl 1999
- Km. 82.000
- Prísur einans: *Kr. 98.600,-*

Um eingin bilur er í býti, verður STÓRUR avsláttur latin

P/f Esmar Simonsen
KAMBSDALUR · TEL 44 44 05 · 22 23 24 · WWW.ES.FO

VW Passat 1.9 TDI St.car



Servostýring, sentrallás, el-rútar framman, el-spegl, el-sóltak og cd-spælara.
Ein ótrúliga snøggur bilur í sera góðum standi

- Ár. juli 1997
- Sonkaður, stylaður og tónaðar rútar
- 17" Alufelgur
- Nýggj píkadekk á eyka felgum
- Nýsýnaður
- Prísur: *Kr. 128.600,-*

P/f Esmar Simonsen
KAMBSDALUR · TEL 44 44 05 · 22 23 24 · WWW.ES.FO

STARVSLÝSING

## Arkitektur/Verkfrøðingur/Byggifrøðingur

**Ert tú áhugaður í nýggjum avbjóðingum á eini ungari deild í menning - verkleiðsludeildini hjá Landsverki? Verkleiðsludeildin varðar av øllum almennum byggiarbeiðum - vegabygging, tunnilsgerð, havnabygging og húsabygging - frá prosjekteringsbyrjan til avhending og garantisýn. Deildin var stovnað fyri umleið fimm árum síðani, og tann, ið verður settur, fer at luttaka í eini framhaldandi menning av deildini.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávurnar eru fjølbroyttar og fevna eitt nú um:
- byggiharraráðgeving
- prosjektstýring
- byggileiðslu
- samskifti við aðalráð, ráðgevarar, arbeiðstakarar og aðrar áhugabólkar
- útbjóðing
- sáttmálar við ráðgevarar og arbeiðstakarar
- prosjektgransking

**Førleikakrøv**
Søkt verður eftir arkitekti/verkfrøðingi/byggifrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving við góðum samstarvsevnum og áhuga fyri omanfyri nevndu málsøkjum. Starvið er sera sjálvstøðugt, og gevur tær góðar møguleikar fyri at fremja tínar hugsjónir í verki. Royndir innan eitt ella fleiri av nevndu virkisøkjum gevur fyrimun, men er eingin treyt, tí roknast kann við neyðugari upplæring ta fyrstu tíðina.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Arbeitt verður skiftitíð, og møguleikar eru fyri eftirútbúgving. Starvið verður sett skjótast til ber ella eftir nærri avtalu.

**Umsóknir**
Umsókn við lívsgongdarlýsing (cv) verður at senda til:

Landsverk
Postsmoga 78
110 Tórshavn

og skal verða okkum í hendi í seinasta lagi 15. september 2005.
Merkið brævbjálvan ”verkfrøðingur til verkleiðsludeildina”

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.
Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Kristiani Rasmussen á tel. 311 333 (t-postur: kr@lv.fo).

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land